NORÐOYA SPARIKASSI

# HÁLVÁRSFRÁSØGN 1. HÁLVÁR 2014

NORĐOYA SPARIKASSI


Ósávegur 1

Postboks 149

FO-710 Klaksvík

Tel. 475000

Fax 476000

ns@ns.fo

www.ns.fo

Deildin í Fuglafirði:

Í Støð 7

FO-530 Fuglafjørður

Tel. 475000

Deildin í Saltangará:

Heiðavegur 21

FO-600 Saltangará

Tel. 475000

Fax 476012

Deildin í Tórshavn:

Hoyvíksvegur 67

FO-100 Tórshavn

Tel. 475000

Fax 476015

# Innihaldsyvirlit


| | | |
|---|---|---|
| LEIÐSLUÁTEKNING | s. | 4 |
| HÁLVÁRSFRÁGREIÐING | s. | 6 |
| RAKSTRARROKNSKAPUR 1. HÁLVÁR | s. | 7 |
| FÍGGJARSTØÐA HIN 30. JUNI | s. | 8 |
| ÚTGREINING AV EGINPENINGI OG SOLVENSTØRVI | s. | 9 |
| LYKLA- OG HØVUÐSTØL | s. | 10 |
| NOTUR | s. | 11 |

# Leiðsluátekning

Nevnd og stjórn hava í dag viðgjørt og góðtikið hálvársfrásøgnina fyri 1. hálvár 2014 fyri Norðoya Sparikassa. Hálvársfrásøgnin er greidd í samsvari við lóg um fíggjarligt virksemi herundir roknskaparkunngerð frá Fíggjareftirlitinum um fíggjarligar frásagnir hjá kredittstovnum v.m.

Tað er okkara fatan, at hálvársfrásøgnin gevur eina rættvísa mynd av sparikassans ognum, skyldum og fíggjarstøðu pr. 30. juni og úrslitinum fyri 1. hálvár 2014.

Hálvársfrásøgnin er ikki grannskoðað.

Klaksvík, hin 25. juli 2014.

Stjórn

Marner Mortensen

Nevnd

| | | |
|---|---|---|
| John P. Danielsen<br>*formaður* | Jóannes Hansen<br>*næstformaður* | Jóhanna á Tjaldrafløtti |
| Karl Heri Joensen | Petur Alberg Lamhauge | Frimodt Rasmussen |
| Julianna Thomsen | Guðrið Lava Olsen | Tummas Martin Sólsker |

# Hálvársfrágreiðing

Úrslitið eftir skatt fyrra hálvár hjá Norðoya Sparikassa batnaði eitt vet sammett við sama tíðarskeið í fjør. Úrslitið eftir skatt fyrra hálvár var eitt avlop upp á 7,2 mió. kr. Sama tíðarskeið í fjør var úrslitið 7,1 mió. kr.

Í undanfarnum ársfrásagnum boðaði sparikassin frá, at málsetningurin var at minka um kredittváðan mótvegis stórum kundum og harvið styrkja gjaldførið og solvensin enn meiri. Sparikassin hevur nú rokkið hesum málsetningum, og tað er hetta, sum nú sæst aftur í roknskapinum.

Lyklatalið fyri stórar kundar er 39,5 % fyri fyrra hálvár 2014, móti 56,3 % fyrra hálvár 2013, ella ein minking á 16,8 %-stig. Innlánsyvirskotið vaks við 146 mió. kr. til 258 mió. kr. fyrra hálvár 2014. Tað var 112 mió. kr. fyrra hálvár 2013. Gjaldførisyvirdekningurin 1. hálvár 2014 er 200 %. Solvensurin hækkaði við 0,4 %-stigum til 18,7 % fyrra hálvár 2014, úr 18,3 % fyrra hálvár 2013. Solvenstørvurin er 11,3 % 1. hálvár 2014. Harvið er solvensyvirdekningurin 7,4 %-stig.

At minka um váðan og harvið at reka ein tryggari peningastovn ber eisini við sær, at inntøkurnar minkað. Úrslitið av vanligum rakstri varð nakað lakari enn sama tíðarskeið í fjør. Úrslitið áðrenn skatt, tá sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan, er eitt avlop upp á 8,7 mió. kr. fyri 1. hálvár 2014. Sama tíðarskeið í fjør var úrslitið 9,9 mió. kr.

Á aðalfundinum í mars samtykti umboðsráðið at renta ábyrgdarpeningin fyri árið 2013 við 5 prosentum yvir ta til eina og hvørja tíð galdandi hægstu rentu fyri innlán uppá 12 mánaðar ella í miðal við 6,5 prosentum. Hesin rentupolitikkur verður óbroyttur fyri 2014. Ábyrgdarar kunnu í mesta lagi eiga upp til kr. 300.000 í ábyrgdarpeningi, uttan at loyvi krevst frá nevndini.

Samanumtikið er sparikassin væl nøgdur við gongdina 1. hálvár 2014.

## ROKNSKAPARFRÁGREIÐING

### Netto rentu- og kostnaðarinntøkur

Netto rentu- og kostnaðarinntøkurnar minkaðu úr 35,2 mió. kr. niður í 34,3 mió. kr. Lækkandi rentustøðið og miðvísa arbeiðið seinastu árini at minka um váðan, minkaðu um inntøkurnar við 0,9 mió. kr.

### Virðisjavnan

Avlopið á virðisjavnan vísir eitt avlop upp á 1,0 mió. kr. fyri 1. hálvár 2014. Sama tíðarskeið í fjør vísti virðisjavnan eitt avlop upp á 2,4 mió. kr. Høvuðsorsøkin til góðu gongdina í virðisjavnanum í fjør var, at sparikassin fyrra hálvár 2013 hevði vinning av fíggjarligum tólum upp á tilsamans 2,5 mió. kr. Avlopið í virðisjavnanum í ár upp á 1,0 mió. kr. stavar í høvuðsheitum frá vinningi av sølu av partabrøvum í Nets.

### Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting

Útreiðslurnar til starvsfólk og fyrisiting hækkaðu úr 23,9 mió. kr. upp í 24,7 mió. kr. Hækkingin upp á 0,8 mió. kr. stavar frá hægri fyrisitingarútreiðslum upp á 0,3 mió. kr. og hægri starvsfólkaútreiðslum upp á 0,5 mió. kr.

### Aðrar rakstrarútreiðslur

Hesin postur umfatar gjald til Innskjótaratrygdargrunnin svarandi til 0,25 % av sparikassans dekkaðu nettoinnlánum. Samlaða gjaldið er 1 % og verður goldið yvir 4 ár - frá 2012 til 2015. Gjaldið í 2014 er 3,0 mió. kr., harav eru 1,5 mió. kr. bókað í roknskapinum fyri 1. hálvár 2014.

### Niðurskrivingar

Fyrra hálvár í ár niðurskrivaði sparikassin útlán og ábyrgdir við 2,4 mió. kr., sum er 2,8 mió. kr. minni enn fyri fyrra hálvár

í fjør, tá ið niðurskrivingarnar vóru 5,2 mió. kr. Sparikassin hevur framt stórar niðurskrivingar seinastu árini, men gongdin í niðurskrivingum seinasta árið ber boð um, at útlit eru fyri, at niðurskrivingarnar komandi árini fara at verða á einum lægri støði, enn vit kenna tað frá undanfarnum árum.

## FÍGGJARSTØÐA

Fíggjarstøða sparikassans øktist við 87 mió. kr. 1. hálvár 2014, úr 1.926 mió. kr. og upp í 2.013 mió. kr. Hetta svarar til eina øking upp á 4,5 %. Høvuðsorsøkin til vøksturin í fíggjarstøðuni er, at innlánini øktust við 4,7 %. Innlánini øktust við 80 mió. kr., úr 1.688 mió. kr. við árslok 2013 og upp í 1.768 mió. kr. 1. hálvár 2014. Útlánini øktust við 25 mió. kr. , úr 1.486 mió. kr. við árslok 2013 og upp í 1.510 mió. kr. 1. hálvár 2014. Hetta er ein vøkstur í útlánum upp á 1,6 %.

## Gjaldføri

Gjaldførið hjá sparikassanum er gott. pr. 1. hálvár í ár var yvirdekningurin í mun til lógarkravið 199,6 % ímóti 143,8 % pr. 1. hálvár í fjør. Sum partur av gjaldførinum hevur sparikassin ein trekningsrætt í Tjóðbankanum uppá 135 mió. kr., men hendan skipanin varð avtikin í juli mánað. Um trekningsrætturin ikki varð tikin við í gjaldførið, hevði yvirdekningurin verðið 126 %. Sambært eftirlitsdiamantinum hjá Fíggjareftirlitinum er minstamarkið fyri yvirdekningin 50 %.

## Solvensur og eginpeningur

Solvensurin hjá sparikassanum er góður. Pr. 1. hálvár í ár var solvensurin 18,7 % í mun til 18,3 % somu tíð í fjør. Vøksturin upp á 0,4 %-stig kemst av, at váðin er minkaður seinasta árið.

Individuelli solvenstørvurin var pr. 1. hálvár 2014 uppgjørdur til 11,3 %, ið er tað sama sum fyri einum ári síðan.

Sostatt hevur sparikassin ein solvensyvirdekning pr. 1 hálvár 2014 upp á 7,4 %.

## Meting fyri 2014

Fyrra hálvár 2014 var avlopið 8,7 mió. kr., tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum upp á útlán og virðisjavnan. Inntøkurnar fyri 2. hálvár verða mettar at verða eitt sindur lakari, tí rentustøðið er lækkað, men sparikassin væntar tó at vinna meginpartin inn aftur við tillagingum av rakstrinum.

Í ársfrásøgnini fyri 2013 varð mett, at avlopið í 2014 fór at vera á sama støði sum í 2013 ella umleið 19 mió. kr., tá ið sæð verður burtur frá niðurskrivingum uppá útlán og virðisjavnan. Nú árið er hálvrunnið, er sparikassin framvegis av tí fatan, at metingin fer at halda.

Tá sannlíkindi eru fyri at niðurskrivingar fyri alt árið verða á einum lægri støði enn undanfarin ár, metir sparikassin, at góð útlit eru fyri, at avlopi eftir skatt fyri alt árið í ár verður betri enn í fjør.

## Váðar og váðastýring

Ongar broytingar eru í váða og váðastýring sparikassans. Víst verður til frágreiðingina í ársfrágreiðingini fyri 2013.

## Hendingar eftir roknskapartíðarskeiðið

Eftir at roknskapartíðarskeiðið endaði 30.06.2014 hevur einki verið, sum ávirkar fíggjarligu gongd sparikassans.

## Óvissur við innrokning og máting

Tær mest týðandi óvissurnar við innrokning og máting eru knýttar at virðisáseting av ognum og niðurskrivingum av útlánum og áogn. Leiðslan metir, at óvissurnar eru á einum støði, sum er nøktandi í mun til hálvársfrásøgnina.

## Nýttur roknskaparháttur

Sparikassin hevur ongar broytingar gjørt í nýttum roknskaparhátti 1. hálvár 2014. Víst verður til ársfrásøgnina fyri 2013.

# Rakstrarroknskapur 1. halvár

| Nota | | 2014<br>1.000 DKK | 2013<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | Rentuinntøkur | 40.988 | 47.617 |
| 2 | Rentuútreiðslur | 9.928 | 14.807 |
| | **Netto rentuinntøkur** | **31.060** | **32.810** |
| | Vinningsbýti av partabrøvum o.ø. | 57 | 57 |
| 3 | Kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 3.368 | 2.660 |
| | Útreiðslur til kostnað og provisión | 219 | 341 |
| | **Netto rentu- og kostnaðarinntøkur** | **34.266** | **35.186** |
| 4 | Virðisjavnan av virðisbrøvum, gjaldoyra o.ø. | 960 | 2.418 |
| | Aðrar rakstrarinntøkur | 1.172 | 936 |
| 5 | Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting | 24.677 | 23.855 |
| | Avskrivingar av ítøkiligum ognum | 642 | 636 |
| | Aðrar rakstrarútreiðslur | 1.470 | 1.723 |
| 6 | Av- og niðurskrivingar upp á skuldarar, netto | 2.433 | 5.229 |
| | **Úrslit áðrenn skatt** | **7.176** | **7.097** |
| | Skattur | 0 | 13 |
| | **Hálvársúrslit** | **7.176** | **7.084** |

# Fíggjarstøða hin 30. juni

| Nota | | 2014<br>1.000 DKK | 2013<br>1.000 DKK | Ársendi 2013<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| | **Ogn** | | | |
| | Kassapeningur og innistandandi uttan uppsøgn í tjóðbankum | 190.021 | 70.313 | 173.241 |
| | Ogn hjá peningastovnum o.ø. | 33.470 | 37.825 | 19.250 |
| | Útlán til amortiserað kostvirði | 1.509.603 | 1.517.927 | 1.485.519 |
| 7 | Lánsbrøv til dagsvirði | 64.851 | 0 | 0 |
| 7 | Lánsbrøv til amortiseraðan kostprís | 128.526 | 184.875 | 164.023 |
| | Partabrøv o.a. | 13.939 | 6.889 | 12.985 |
| | Fastognir íalt | 38.028 | 37.990 | 36.395 |
| | Íløguognir | 22.710 | 22.710 | 22.710 |
| | Fastognir til egna nýtslu | 15.318 | 15.280 | 13.685 |
| | Aðrar materiellar ognir | 9.341 | 8.875 | 9.883 |
| | Aktuell skattaáogn | 59 | 31 | 44 |
| | Yvirtiknar ognir | 18.340 | 17.376 | 19.315 |
| | Aðrar ognir | 5.910 | 11.048 | 4.283 |
| | Tíðaravmarkingar | 450 | 0 | 956 |
| | **Ogn tilsamans** | **2.012.538** | **1.893.149** | **1.925.894** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur** | | | |
| | Skuld | | | |
| | Skuld til peningastovnar og tjóðbankar | 15 | 20.351 | 256 |
| | Innlán | 1.767.576 | 1.629.931 | 1.687.822 |
| | Onnur skuld | 20.420 | 27.139 | 22.195 |
| | Tíðaravmarkingar | 1.522 | 215 | 217 |
| | **Skuld tilsamans** | **1.789.533** | **1.677.636** | **1.710.490** |
| | | | | |
| | **Avsetingar** | | | |
| | Avsetingar til eftirløn o.a. | 2.302 | 2.430 | 2.302 |
| | Avsetingar til tap upp á ábyrgdir | 189 | 100 | 150 |
| | Aðrar avsetingar | 147 | 0 | 147 |
| | **Avsetingar tilsamans** | **2.638** | **2.530** | **2.599** |
| | | | | |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 51.285 | 50.943 | 51.285 |
| | | | | |
| | **Eginpeningur** | | | |
| | Ábyrgdarpeningur | 8.988 | 7.150 | 8.182 |
| | Flutt frá undanfarnum árum | 152.768 | 147.805 | 147.805 |
| | Regulering av ábyrgdarpeningi undanfarið ár | 0 | 0 | 77 |
| | Úrslit eftir skatt | 7.176 | 7.084 | 4.886 |
| | Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 420 |
| | Gávugrunnur | 150 | 0 | 150 |
| | **Eginpeningur tilsamans** | **169.082** | **162.039** | **161.520** |
| | | | | |
| | **Skuld og eginpeningur tilsamans** | **2.012.538** | **1.893.149** | **1.925.894** |
| | | | | |
| 8 | Aðrar skyldur | | | |

# Útgreining av eginpeningi og solvenstørvi

| | 2014<br>1.000 DKK | 2013<br>1.000 DKK | Ársendi 2013<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| **Kapitalflytingar** | | | |
| Ábyrgdarpeningur við ársbyrjan | 8.182 | 6.795 | 6.795 |
| Tilgongd | 971 | 460 | 1.649 |
| Frágongd | -165 | -105 | -262 |
| **Ábyrgdarpeningur tilsamans** | **8.988** | **7.150** | **8.182** |
| | | | |
| Flutt avlop við ársbyrjan | 152.768 | 147.805 | 147.805 |
| Flutt úrslit | 7.176 | 7.084 | 4.886 |
| Regulering av ábyrgdarpeningi undanfarið ár | 0 | 0 | 77 |
| **Flutt avlop tilsamans** | **159.944** | **154.889** | **152.768** |
| | | | |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | 420 |
| Gávugrunnur | 150 | 0 | 150 |
| **Eginpeningur tilsamans** | **169.082** | **162.039** | **161.520** |
| | | | |
| **Kapital- og solvensuppgerð** | | | |
| Eginpeningur | 169.082 | 162.039 | 161.520 |
| Hálvársúrslit | -7.176 | -7.084 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -420 |
| Hybridur kjarnukapitalur | 25.785 | 50.943 | 25.785 |
| **Kjarnukapitalur aftaná frádrøg tilsamans** | **187.691** | **205.898** | **186.885** |
| | | | |
| Eginpeningur | 169.082 | 162.039 | 161.520 |
| Hálvársúrslit | -7.176 | -7.084 | 0 |
| Tilmælt renta av ábyrgdarpeningi | 0 | 0 | -420 |
| Hybridur kjarnukapitalur | 25.785 | 50.943 | 25.785 |
| Ábyrgdarlán | 25.500 | 0 | 25.500 |
| **Basiskapitalur áðrenn frádrøg tilsamans** | **213.191** | **205.898** | **212.385** |
| | | | |
| Vektað tøl tilsamans | 1.138.285 | 1.125.435 | 1.092.578 |
| Solvensprosent | 18,7 | 18,3 | 19,4 |
| Kjarnukapitalprosent | 16,5 | 18,3 | 17,1 |
| | | | |
| **Uppgerð av solvenstørvi eftir kreditavsetingarháttinum** | | | |
| Kredittváði | 32.416 | 32.125 | 38.468 |
| Marknaðarváði | 5.400 | 5.408 | 6.922 |
| Oprationellur váði | 0 | 0 | 0 |
| Annar váði | 0 | 0 | 0 |
| Lógarkrøv | 91.063 | 90.035 | 87.406 |
| **Solvenstørvur tilsamans** | **128.879** | **127.567** | **132.796** |
| | | | |
| Solvenstørvur (%) | 11,3 | 11,3 | 12,2 |
| Solvensyvirdekningur (%-stig) | 7,4 | 7,0 | 7,2 |
| Solvensyvirdekningur (%) | 65,5 | 61,9 | 59,0 |

# Lykla- og høvuðstøl

| Lyklatøl | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|
| Solvensprosent | 18,7 | 18,3 | 16,7 | 15,7 | 16,9 |
| Kjarnukapitalprosent | 16,5 | 18,3 | 16,7 | 15,7 | 16,9 |
| Hálvársrenting av eginpeningi áðrenn skatt | 4,3 | 4,3 | 1,9 | 2,4 | -5,9 |
| Hálvársrenting av eginpeningi aftaná skatt | 4,3 | 4,3 | 1,5 | 2,0 | -5,1 |
| Úrslit fyri hvørja kostnaðarkrónu | 1,3 | 1,2 | 1,1 | 1,14 | 0,72 |
| Rentuváði | 1,7 | 3,0 | 1,7 | 2,5 | 4,8 |
| Gjaldoyrastøða | 0,7 | 0,3 | 0,3 | 0,3 | 0,2 |
| Gjaldoyraváði | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 | 0,0 |
| Útlán og niðurskrivingar í mun til innlán | 88,0 | 93,3 | 104,8 | 114,3 | 107,0 |
| Gjaldføri yvir lógarinnar kravi | 199,6 | 143,8 | 136,4 | 125,5 | 257,8 |
| Stórir kundar tilsamans í mun til basiskapital | 39,5 | 56,3 | 83,4 | 90,6 | 87,9 |
| Akkumulerað niðurskrivingarprosent | 2,8 | 3,2 | 3,5 | 3,9 | 3,9 |
| Taps- og niðuskrivingarprosent í hálvárinum | 0,1 | 0,3 | 0,3 | 0,3 | 0,6 |
| Útlánsvøkstur í hálvárinum | 0,6 | 2,5 | -1,4 | -1,8 | -3,1 |
| Útlán í mun til eginpening | 8,9 | 9,4 | 9,0 | 9,2 | 8,0 |

| Høvuðstøl (1.000 DKK) | 2014 | 2013 | 2012 | 2011 | 2010 |
|---|---|---|---|---|---|
| **Rakstrarroknskapartøl** | | | | | |
| Netto rentu- og kostnaðarinntøkur | 34.266 | 35.186 | 37.500 | 34.975 | 37.293 |
| Aðrar vanligar inntøkur | 1.173 | 936 | 787 | 178 | 489 |
| **Vanligar inntøkur íalt** | **35.439** | **36.122** | **38.287** | **35.153** | **37.782** |
| | | | | | |
| Rakstrarútreiðslur o.a. | 26.147 | 25.577 | 27.091 | 27.197 | 35.963 |
| Av- og niðurskrivingar, ítøkilig ogn | 642 | 636 | 1.336 | 2.047 | 2.007 |
| **Vanligar útreiðslur íalt** | **26.789** | **26.213** | **28.427** | **29.244** | **37.970** |
| | | | | | |
| **Úrslit av vanligum rakstri** | **8.650** | **9.909** | **9.860** | **5.909** | **-188** |
| | | | | | |
| Virðisjavnan | 960 | 2.418 | -1.284 | 3.801 | -1.108 |
| Av- og niðurskrivingar, skuldarar | 2.433 | 5.230 | 5.242 | 4.839 | 12.874 |
| **Úrslit áðrenn skatt** | **7.177** | **7.097** | **3.334** | **4.871** | **-14.170** |
| | | | | | |
| Skattur | 0 | 13 | 600 | 765 | -1.773 |
| **Úrslit** | **7.177** | **7.084** | **2.734** | **4.106** | **-12.397** |
| | | | | | |
| **Fíggjarstøða** | | | | | |
| Útlán | 1.509.603 | 1.517.927 | 1.601.290 | 1.671.468 | 1.780.855 |
| Virðisbrøv | 207.316 | 191.764 | 189.303 | 340.387 | 43.118 |
| Innlán | 1.767.577 | 1.629.931 | 1.586.154 | 1.522.481 | 1.727.583 |
| Útgivin lánsbrøv | 0 | 0 | 86.081 | 449.730 | 649.513 |
| Javni | 2.012.538 | 1.893.149 | 2.134.987 | 2.229.446 | 2.756.799 |
| Eginpeningur | 169.082 | 162.039 | 177.736 | 181.375 | 222.164 |
| Ábyrgdir | 49.769 | 43.050 | 45.731 | 40.588 | 43.504 |

# Notur

| Nota | | 2014<br>1.000 DKK | 2013<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|
| 1 | **Rentuinntøkur** | | |
| | Innistandandi í peningastovnum o.a. | 87 | 28 |
| | Útlan | 39.943 | 46.670 |
| | Lánsbrøv | 958 | 919 |
| | **Rentuinntøkur tilsamans** | **40.988** | **47.617** |
| 2 | **Rentuútreiðslur** | | |
| | Innistandandi hjá peningastovnum | 1 | 141 |
| | Innlán | 7.502 | 10.721 |
| | Eftirstillað kapitalinnskot | 2.419 | 2.733 |
| | Ábyrgdarpeningur | 0 | 85 |
| | Aðrar rentuútreiðslur | 6 | 1.127 |
| | **Rentuútreiðslur tilsamans** | **9.928** | **14.807** |
| 3 | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur** | | |
| | Virðisbrøv og goymsla | 24 | 20 |
| | Gjaldstænastur | 974 | 916 |
| | Lánisakskostnaður | 1.166 | 521 |
| | Provisión av ábyrgdum | 429 | 403 |
| | Aðrar kostnaðar- og provisiónsinntøkur | 775 | 800 |
| | **Kostnaðar- og provisiónsinntøkur tilsamans** | **3.368** | **2.660** |
| 4 | **Virðisjavnan** | | |
| | Lánsbrøv | 8 | -93 |
| | Partabrøv | 939 | -6 |
| | Gjaldoyra | 13 | -26 |
| | Fíggjarlig tól | 0 | 2.543 |
| | **Virðisjavnan tilsamans** | **960** | **2.418** |
| 5 | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting** | | |
| | Løn og samsýning til umboðsráð, nevnd og stjórn | | |
| | Stjórn | 883 | 967 |
| | Nevnd | 403 | 406 |
| | Umboðsráð | 75 | 65 |
| | **Tilsamans** | **1.361** | **1.438** |
| | **Starvsfólkaútreiðslur** | | |
| | Løn | 9.709 | 9.205 |
| | Eftirløn | 1.666 | 1.674 |
| | Útreiðslur til sosiala trygd | 1.792 | 1.677 |
| | **Tilsamans** | **13.167** | **12.556** |
| | Aðrar fyrisitingarútreiðslur | 10.149 | 9.861 |
| | **Útreiðslur til starvsfólk og fyrisiting tilsamans** | **24.677** | **23.855** |
| | Miðaltal av starvsfólkum, ársverk | 45,4 | 44,4 |

# Notur

| Nota | | 2014<br>1.000 DKK | 2013<br>1.000 DKK | Ársendi 2013<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | Niðurskrivingar upp á útlán v.m. | | | |
| | **Individuellar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 42.910 | 53.154 | 53.154 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán | 5.590 | 12.019 | 22.029 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -2.541 | -8.202 | -10.620 |
| | Avskrivað (staðfest tap) | -5.537 | -10.554 | -21.653 |
| | **Akkumuleraðar individuellar niðurskrivingar tilsamans** | **40.422** | **46.417** | **42.910** |
| | Niðuskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 129.277 | 157.931 | 134.895 |
| | Individuellar niðurskrivingar tilsamans | -40.422 | -46.417 | -42.910 |
| | **Niðurskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **88.855** | **111.514** | **91.985** |
| | **Bólkaðar niðurskrivingar** | | | |
| | Akkumuleraðar niðurskrivingar upp á útlán við ársbyrjan | 6.118 | 5.589 | 5.589 |
| | Niðurskrivingar upp á útlán | 184 | 849 | 1.910 |
| | Afturførdar niðurskrivingar | -754 | -346 | -1.381 |
| | **Akkumuleraðar bólkaðar niðurskrivingar tilsamans** | **5.548** | **6.092** | **6.118** |
| | Niðuskrivað útlán tilsamans, áðrenn niðurskrivingar | 1.108.009 | 1.194.828 | 1.166.435 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar tilsamans | -5.548 | -6.092 | -6.118 |
| | **Niðuskrivað útlán tilsamans, eftir niðurskrivingar** | **1.102.461** | **1.188.736** | **1.160.317** |
| | **Niðurskrivingar tilsamans** | **45.970** | **52.509** | **49.028** |
| | **Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir** | | | |
| | Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir við ársbyrjan | 150 | 443 | 443 |
| | Burturleggingar í árinum | 39 | 0 | 50 |
| | Afturførdar burturleggingar | 0 | 343 | -343 |
| | **Akkumuleraðar burturleggingar upp á ábyrgdir tilsamans** | **189** | **100** | **150** |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar tilsamans** | **46.159** | **52.609** | **49.178** |

# Notur

| Nota | | 2014<br>1.000 DKK | 2013<br>1.000 DKK | Ársendi 2013<br>1.000 DKK |
|---|---|---|---|---|
| 6 | Niðurskrivingar upp á útlán (framhald) | | | |
| | **Samanseting til rakstrarroknskapin** | | | |
| | Individuellar niðurskrivingar upp á útlán netto | 3.131 | 3.467 | 11.408 |
| | Individuellar burturleggingar upp á ábyrgdir netto | -39 | 100 | 293 |
| | Bólkaðar niðurskrivingar netto | -571 | 503 | 529 |
| | Renta av niðurskrivaðum parti av lánum | -731 | -968 | -1.664 |
| | Staðfest tap í árinum, ið ikki áður eru niðurskrivaði | 688 | 1.745 | 3.651 |
| | Inngoldið til áður avskrivaði krøv | -45 | -317 | -400 |
| | Niðurskrivingar av yvirtiknum ognum | 0 | 700 | 1.661 |
| | **Niðurskrivingar og burturleggingar til rakstrarroknskapin tilsamans** | **2.433** | **5.230** | **14.892** |
| 7 | **Lánsbrøv** | | | |
| | Skrásett á keypsskálum - dagvirði | 64.851 | 0 | 0 |
| | Skrásett á keypsskálum - amortiserað kostprís | 128.526 | 184.875 | 164.023 |
| | **Lánsbrøv tilsamans** | **193.377** | **184.875** | **164.023** |
| | Munur á amortiseraðum kostprísi og dagsvirði | -68 | -1.934 | 1.638 |
| | **Lánsbrøv til dagsvirði tilsamans** | **193.309** | **182.941** | **165.661** |
| 8 | **Aðrar skyldur uttanfyri javnan** | | | |
| | Fíggjarábyrgdir | 5.922 | 5.929 | 5.928 |
| | Tapsábyrgdir | 3.518 | 0 | 796 |
| | Aðrar skyldir | 40.329 | 37.121 | 31.527 |
| | **Aðrar skyldir uttanfyri javnan tilsamans** | **49.769** | **43.050** | **38.251** |

www.ns.fo